Fróðskaparsetur Føroya

# Krøv til skráseting í próvbókini fyri at kunna skriva út prógv

**Til tess at kunna skriva út prógv, tá studentur er liðugur við sína útbúgving, eru krøv til skráseting í próvbókini. Skrásetingin byrjar, tá útbúgvingin byrjar, og skrásetast skal leypandi** (studentar, skeið, próvtøkur, uppgávuheiti, góðskrivingar, próvdómarar o.a.) **gjøgnum alt útbúgvingartíðarskeiðið.**

**Tilmelding av útbúgving**

- **Útbúgvingarheiti** (á føroyskum og enskum) (oyðublað)
- **Við útbúgvingartíðarskeiði**
- **Við skeiðum, ið hoyra til útbúgvingina**
- **Við tilvísing til kunngerð, sum heimilar útbúgvingina** (á føroyskum og enskum)
- **Tilmeldingin skal verða undirskrivað av dekani/undirvísingarleiðara**

**Tilmelding av skeiði** (oyðublað)

- **Heiti á skeiði** (á føroyskum og enskum)
- **Skeiðsnummar 6 siffur xxxx.xx**
- **ECTS-áseting**
- **Skeiðslýsing** (á føroyskum og enskum)
- **Tilmeldingin skal verða undirskrivað av dekani/undirvísingarleiðara**

**Tilmelding av studenti** (oyðublað)

- **Studenturin váttar innskriving** (skal endurnýggjast við hvørja lestarársbyrjan) **við**
- **Fullum navni**
- **Føðingardegi**
- **Bústaði, verandi og permanentum**
- **Gevur aðrar relevantar upplýsingar, tlf.nr., teldupostbústað**
- **Váttanin skal verða undirskrivað av studentinum sjálvum og dekani**

**Hesar upplýsingar verða teir, ið verða skrásettir í próvbókini um studentin. Tað er tí sera umráðandi, at allir teigarnir eru týðiliga útfyltir.**

**Tilmelding av próvdómara**

**Próvdómarar verða góðkendir fyri eitt tíðarskeið uppá 5 ár í senn (verandi tíðarskeið er 1.4.08-31.3.13). Próvdómari skal verða góðkendur, áðrenn próvtøkan verður hildin. Próvdómari verður skrásettur í próvbókin frá tí degi, Mentamálaráðið góðkennir. Deildin skal lata Setursskrivstovuni umsókn um próvdómaragóðkenning (undirskrivað av dekani) við hesum upplýsingum:**

- **CV hjá persóninum**
- **Hvat starv viðkomandi hevur**
- **Lærugrein, sum persónurin skal góðkennast til – um ikki generella góðkenning til deildina**

- **Rektarin sendir síðan umsókn til Mentamálaráðið um próvdómaragóðkenning. Tað kann taka 1-2 vikur at fáa eina góðkenning.**

**Tilmelding til próvtøku** (oyðublað)

- **Skeið**
- **Dato, klokkutíð, stað**
- **Slag av próvtøku** (skrivlig, munnlig ....)
- **Evt. viðmerkingar**
- **Lærari**
- **Próvdómari**
- **Studentar**
- **Evt. uppgávuheiti hjá hvørjum einstøkum studenti** (oyðublað)
- **Tilmeldingin skal verða undirskrivað av útbúgvingarleiðara/lærara á tí ávísu lærugreinini**
- **Deildin fær síðan eitt próvbókarblað, sum skal latast próvbókarfyrisitingini aftur – uppmøtingin skal verða váttað av próvtøkuvakt, próvtalakolonnan skal verða útfylt, og próvbókarblaðið skal verða undirskrivað av lærara og próvdómara.**

Góðskriving

**Tá deild viðmælir, at studentur kann fáa part/ar av útbúgving frá øðrum lærustovni góðskrivað fyri skeið í lestrinum, skal viðmæli latast rektaranum, sum skal góðkenna góðskrivingina. Próvbókarfyrisitingin skal hava:**

- **Navn á studentinum**
- **Navn á lærustovni**
- **Dato, sum skeiðið er tikið á øðrum lærustovni**
- **Heiti á tí eksterna skeiðnum** (á enskum og evt. á tí máli, sum lærustovnurin nýtir)
- **Heiti og nummar á skeiðnum, sum skal góðskrivast.**

Diploma Supplement

**Umframt sjálvt prógvið fær studenturin eisini eitt Diploma Supplement, sum er skrivað á enskum. Próvbókarfyrisitingin skal hava hesar upplýsingar** (á enskum):

- **Main fields of study**
- **Language/s of instruction/examination**
- **Level of qualification**
- **Official length of programme**
- **Mode of study**
- **Programme requirements**
- **Access to further study**

**Setursskrivstovan, 23. mars 2010**